

*Tá leitast skal aftur í sjeytiárini, so slepst ikki undan Jørgin Dahl. Hesaferð stóð hann á odda fyri Straight Ahead, bólkurin, sum setti standardin í sjeytiárunum*

# Øll komu við

**Straight Ahead var eitt av forvitnisligu nøvnunum, ið fór á pallin á Summarfestivalinum. Og teir sungu Komið Øll Við og fingu óivað nærum hvønn einasta festivalgest við sær**

SUMMARFESTIVALURIN 05
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Klaksvíkingar hava í fleiri áratíggju rópt seg føroyska tónleikahøvuðsstaðin ella føroyska Nashville. Og við rætti. Ì nógv ár eru størstu nøvnini innan tónleik komin úr Klaksvík.

Og hetta gevur teimum ein gyltan møguleika at grava garvaðar rockarar fram aftur og aftur í ár nýtti Summarfestivalurin hendan møguleikan. Og tá leitast skal aftur í sjeytiárini, so slepst ikki undan Jørgin Dahl.

Hesaferð stóð hann á odda fyri Straight Ahead, bólkurin, sum setti standardin í sjeytiárunum og sum við Veðraplátuni setti sær ein tann største varðan í føroysku rocksøguni.

Bólkurin hevur ikki spælt nógv, síðani teir fóru hvør til sítt í 1978. Bert einaferð aftur fóru teir á pall, nevniliga í 1989.

Hvat fólk væntaðu sær av gomlu rockveteranunum veit eg ikki. Sjálvandi hava tey flestu hugsað um gomlu slagararnar, so sum Komið øll Við, Tú Veitst og Heading for Disaster.

Og gomlu hittini – harav okkurt er endurinnspælt av øðrum bólkum- liva enn millum manna, tað gjørdist heilt greitt á Summarfestivalinum í ár.

## Streymurin fór

Manningin var eitt sindur broytt. Eini 3 av upprunamanningini vóru við og sjálvandi við Jørgen Dahl í oddinum.

Talan var um eina framførslu, sum átti stóran part av tí orku, ið skal til slíkan tónleik. Myrki trummuleikarin setti veruliga dám á. Ikki minst, tá streymurin fór á pallinum og øll orka varð tikin frá bólkinum. Tá tók hann, sum onki var hent, og spældi víðari á síni mongu ásláttursljóðfør, eins og hann eisini var sera dugnaligur at fáa fjøldina við sum heild.

Mikkjal Hvannastein er ung-ur guitarleikari, men slapp veruliga at royna seg og fekk rúm og tíð undur fremstu pallperunum. Og hann takkaði við frálíkum guitarspæli.

Allar tær góðu gomlu løturnar komu aftur við tónunum frá sjeytiárunum. Og hetta gjørdist ein løta og ein konsert, ið var júst soleiðis, sum slíkar eru og eiga at vera.

Nostalgi. Tað er nokk orðið, ið best lýsir løtuna. men hetta er ikki nakað keðiligt, tí tá okkrut gerst nostalgi, so prógvar tað bert, at tað hevur livað og yvirlivað tíðarinnar tonn. Og at tað ikki fór í gloymibókina, men heldur hevði egið lív, hóast so mangt annað fór við tíðarstreyminum og sást ikki aftur.

Straight Ahead eiga løgini, ið kunnu halda teimum uppi. Og tónleikaliga riggaði væl hjá teimum. Stuttligt, at tað bar til at hoyra hendan legendariska bólkin enn einaferð.

Alt gekk so at siga í eina hægri eind, har sjeytiárini áttu lív í eini stak hugnaligari og hugvekjandi løtu á Vágsbø.

# Festligur Lawetzpoppur



*Glaði og festligi poppurin hjá Lawetz legði upp til, at tónleikurin var hart frá*

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Lawetz spældu rættuliga tíðliga fríggjakvøldið, men alíkavæl var rættuliga nógv fólk savnað í 1000 fermetrar stóra flaggsteltinum. Tó ikki nóg nógv fólk til at ljóðmyndin gjørdist nøkurlunda góð. Teltið hevði ein keðiligan eftirklang, sum fekk flestu bólkarnar, sum spældu har, at ljóða óneyðuga illa, tó betraðist ljóðið alt fleiri fólk vóru í teltinum.

Glaði og festligi poppurin hjá Lawetz legði upp til, at tónleikurin var hart frá, og hetta fekk ljóðið at versna enn meira. Ljóðmaðurin Alexander Gaard, sum telist millum bestu ljóðmenn í landinum, stríddist fyri at fáa tað at ljóða væl, men til fánýtis. Ringa ljóðgóðskan og tað rættuliga ósjarmerandi umhørvið í teltinum var ein vána karmur fyri ein av teimum mest spennandi føroysku bólkunum. Men bólkurin kom væl frá uppgávuni.

Spæligleði og góð løg eyðkendu framførsluna. Tónleikurin var eitt sindur 80'ara kendur poppur á ein modernaðan hátt, við tveimum blásarum, tveimum gittarum, bassi, trummum, sangi og kóri, var ljóðmyndinn bæði festlig og stór. Tilfari var nýtt tilfar, og tilfar vit kenna frá Prix Føroyar undankappingunum í ár og fyrra árið.

Serliga vóru tað løgini Completely og Glasbúrið, sum bæði hava verið á 15 teimum bestu, ið fingu lív í áhoyrararnar. Lawetz eru tíanverri ikki so virknir á konsertpallinum, og tað var tí eitt kærkomið høvi at hoyra teir. Hetta vóru áhoyrararnir kanska greiðir yvir, tí teir vildu illa sleppa bólkinum av pallinum aftur, og "umaftur" rópini rungaðu í teltinum, men Lawetz høvdu ikki nakað eykalag at spæla, so tað varð av ongum.